umhvørvisstovan

# Umhvørvisgóðkenning

| Navn á virki við góðkenning: | |
|---|---|
| **P/f Magn** | |
| Bústaður hjá virki: | |
| Vestara Bryggja 10, FO-110 Tórshavn | |
| Galdandi fyri virksemi: | |
| At framleiða ravmagn við vindmyllum | |
| Matr. nr.: | V-tal: |
| 1160a | 321621 |
| Mál nr.: | Galdandi frá: |
| 20/00292 | 20. august 2020 |

Argir, hin 20. august 2020

Suni Petersen, deildarleiðari /

Katrin Haraldsdóttir Jensen, málsviðgeri

# 1. Góðkenning og heimildir

Henda umhvørvisgóðkenning av vindmyllum hjá P/F Magn á matr. nr. 1160a í Flatnahaga er givin við heimild í § 26, 29 og 31 í umhvørvisverndarlógini[1] og § 1, nr. 4 í kunngerð[2] um um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, við seinni broytingum.

Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin, kunnu sambært §34, stk. 4 ikki gevast onnur boð ella forboð, enn ásett í hesi góðkenning, uttan so at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um ampar/árin.
- vindmyllurnar elva til dálking ella ampar/árin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin.
- árin og dálkingin í aðrar mátar eru størri enn góðkenningin er givin eftir.

Tá ið meira enn 5 ár eru gingin, eftir at góðkenningin er lýst, kann Umhvørvisstovan sambært §34, stk. 5 í lógini[1] broyta treytirnar í góðkenningini, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri tøkni ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

Eftirlitið við virkseminum verður útint sambært kap. 7 í lógini[1].

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari løggávu.

# 2. Umsóknin

Umhvørvisstovan fekk tann 22. januar 2020 umsókn um umhvørvisgóðkenning av vindmylluverkætlan í Flatnahaga frá P/F Magn.

Í umsóknini eru upplýsingar um ætlaða virksemið, umframt at víst verður til umhvørvisárinsmetingina[3] fyri verkætlanina, sum varð latin Umhvørvisstovuni til góðkenningar tann 25. november 2019. Umhvørvisárinsmetingin er gjørd sambært kravi í § 16 í elveitingarlógini um, at umhvørvisárinsmeting skal gerast áðrenn loyvi til ravmagnsframleiðslu verður latið. Umhvørvisstovan góðkendi umhvørvisárinsmetingina hin 20. august 2020.

# 3. Lýsing av virkseminum

Magn ætlar at seta seks vindmyllur upp í Flatnahaga. Talan er um seks Enercon-vindmyllur (E-82) upp á 3,0 MW hvør, samanlagt 18 MW. Vindmyllurnar fara væntandi at framleiða tilsamans umleið 64 GWt av grønari orku um árið. Hæddin á torninum er 78 m, tvørmátið á veingjunum er 82 m, og samlaða hæddin 119 m. E-82 vindmyllurnar eru framleiddar og góðkendar til strangasta vindklassa (IEC windclass Ia). Tær eru eisini bygdar og settar saman soleiðis, at tær lúka íbindingartreytirnar hjá SEV. Vindmyllurnar kunnu framleiða

[1] Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, við seinni broytingum

[2] Kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, við seinni broytingum

[3] Vindorkuverkætlan í Flatnahaga Umhvørvisárinsmeting. Novembur 2019, US-Mál nr. 19/00885

orku, tá ið vindferðin er millum 2,5 m/sek og 34 m/sek. Íbindingarstaðið verður við 60 kV koplingsstøðina hjá SEV á Húsareyni og 3 x 240mm$^2$ aluminium kaðlar verða brúktir.

Vindmyllurnar fara at standa í Flatnahaga vestan fyri Oyggjarvegin, meðan vindmyllurnar hjá SEV eru í Húsahaga, eystan fyri Oyggjarvegin og tætt við stóru mastrina á Húsareyni. Vindmátingar eru gjørdar á Húsareyni seinastu 8 árini og sostatt eru vindviðurskiftini í økinum væl kend. Hesar mátingar vísa, at miðal vindferðin liggur um 10 m/sek og mesti vindurin er vanliga undir 34 m/sek, tó eru mátingar gjørdar har vindferðin var upp í 50 m/sek.

Vindmyllurnar verða settar soleiðis, at tær gagnnýta tær ráðandi ættirnar á staðnum á besta hátt. Alt anleggsarbeiði so sum atkomuvegir, fundament og vindmylluupláss verða løgd soleiðis, at tey fella best møguligt inn í verandi lendi. Vindmylluveitarin hevur vegleiðingar og krøv til millum annað breidd og hall á atkomuvegi, styrki av undirlendi, stødd av vindmylluplássum, umframt slag og styrki av fundamentum, hesi krøv verða fylgd. Vegurin verður fýra metrar breiður og samlaða vegalongdin verður 1.750 metrar. Rør verða løgd undir vegnum, har tørvur er á tí, so at vatn kann leiðast burtur. Bundið verður í Oyggjarvegin áleið 450 metrar norðan fyri avkoyringina til mastrarnar á Bøllureyni. Økið, ið er lagt av til verkætlanina, er 500.000 m$^2$, og væntandi verða 28.000 m$^2$ brúktir til vindorkuvirksemið.

Vindmyllurnar verða framleiddar á tann hótt, at tær ikki tørva stórvegis smyrjiolju, ið kann verða dálkandi fyri umhvørvið. Allir lutir, ið tørva olju, hava eina trygdarskipan, ið tryggjar at ein møguligur oljuleki verður verandi inni í lutinum og sleppur ikki út í umhvørvið. Av tí at vindmyllurnar ikki hava gear, er oljutørvurin lutfalsliga avmarkaður. Í hvørji vindmyllu eru áleið 84 litrar av olju, botnurin er tættur og kann rúma allari oljuni, um so er at leki kemur fyri.

## 4. Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

P/F Magn hevur gjørt eina umhvørvisárinsmetingin fyri virksemið sambært elveitingarlógini. Árinsmetingin viðgerð hvørji árin verkætlanin kann hava á náttúru og umhvørvi. Hugt verður eftir hvussu verkætlanin væntast at ávirka djóra- og plantulívið á staðnum, hvussu vindmyllurnar síggjast í landslagnum, og mett verður, um vindmyllurnar fara at elva til ampa orsakað av óljóði, skuggakasti og endurskini. Òljóð og skuggakast eru mest týðandi umhvørvisligu árinini.

*Óljóð*

Óljóð kemur frá vindmyllum, sum mæla, og økist óljóðið við vaksandi vindferð. Tó økist ljóðið frá vindinum sjálvum lutfalsliga meira og ofta hoyrist óljóð frá vindmyllum best tá vindmegin er 6 - 8 m/s. Óljóð frá vindmyllum kann vera til ampa hjá teimum, sum búgva nærhendis vindmyllum.

Útrokningar eru gjørdar av, hvussu ljóðið frá vindmyllunum spjaðist út frá teimum. Av tí at vindmyllurnar í Flatnahaga fara at standa lutfalsliga tætt við myllurnar hjá SEV í Húsahaga, eru eisini útrokningar gjørdar, har hugt verður eftir, hvussu samlaða óljóðið frá hesum báðum vindmylluverkunum spjaðist. Út frá hesum verður ikki mett, at ampi verður av óljóði frá vindmyllunum í verandi í bústaðarøkjum. Tó vísa útrokningar, at óljóðið er oman fyri galdandi markvirði í ávísum økjum, sum eru ætlað til bústaðarøki og frítíðarøki, sambært byggisamtyktini hjá Tórshavnar kommunu. Treytir verða settar um óljóð.

*Skuggakast*
Tá ein vindmylla stendur soleiðis fyri sólini, at malandi veingirnir kasta skugga, verður hetta nevnt skuggakast. Hetta kann fatast sum ljós, ið blunkar. Skuggakast kemur mest fyri, tá sólin stendur lágt á luftini, t.e. í desember og januar mánað. Um skuggakast kemur fyri í bústaðarøki, kann tað vera ørkymlandi og til ampa hjá íbúgvum. Útrokningar vísa, at eingin vandi er fyri skuggakasti í bygdum øki. Mett verður ikki, at skuggakast fer at tarna ferðsluni á Oyggjarvegnum, hóast skuggakast kann koma fyri har. Treytir verða settar um skuggakast.

*Onnur viðurskifti*
Mett verður ikki, at nakar ampi verður av endurskini frá vindmyllunum. Vindmyllurnar verða viðgjørdar við serligari "anti-reflektivari" máling og veingirnir eru rundaðir soleiðis, at hetta eisini minkar um endurskin.
Í vanligum rakstri er lítið og einki annað útlát uttan t.d. burturkast í sambandi við viðlíkahald. Treytir verða settar um at halda økið við vindmyllurnar ruddiligt, og at fara vandaliga um, tá viðlíkahald fer fram.
Mett verður ikki, at ampi verður av lukti, royki ella dusti frá virkseminum.

# 5. Málsviðgerð

Í sambandi við málsviðgerðina er serligur dentur lagdur á, at ampar av óljóði og skuggakasti eru minst møguligir, og at umhvørvið ikki verður dálkað.

Sambært umhvørvisárinsmetingini verður óljóðið og skuggakastið frá vindmyllunum undir ásettu markvirðum í nærmastu bústaðarøkjum. Tó vísa útrokningar, at óljóðið er oman fyri galdandi markvirði í ávísum økjum, sum eru ætlað til bústaðarøki og frítíðarøki, í byggisamtyktini hjá Tórshavnar kommunu. Talan er um trý ymisk øki. Øki A1, sum er lagt út til lága bústaðarbygging, øki D1, sum er lagt út til frílendi og øki D2, sum er lagt út til ítróttarøki. Øki A1 er niðan fyri Oyggjarvegin og øki D1 og D2 eru í Havnardali.

Umhvørvisstovan gjørdi á fundi við Tórshavnar býráð tann 29. apríl 2020 vart við, at ávís øki, sum sambært byggisamtyktini eru løgd av til bústaðarøki og frítíðarendamál, kunnu verða ávirkað av óljóði frá ætlaðu vindmyllunum í Flatnahaga.

Býráðið viðgjørdi á býráðsfundi 28. mai 2020 serstøku byggisamtyktina fyri vindmyllur í Flatnahaga og í hesum sambandi varð øki A1 eisini viðgjørt. Her verður sagt, at kommunan ikki hevur ítøkiligar ætlanin um at byggja bústaðir á øki A1, men tað er ikki óhugsandi at tað verður bygt á økinum innan 20 ár. Partur av treytunum í avtaluni við Magn er, at vindmyllurnar verða burturbeindar aftaná 20 ár. Býráðið mælir til at ljóðmátingar verða gjørdar í øki A1, tá ið vindmyllurnar eru virknar, og at frávik verður givið umsøkjara at halda ásettu ljóðkrøvini fyri part av A1 økinum niðan fyri Oyggjarvegin.

Eingin viðgerð var av øki D1 og D2 á býráðsfundinum, og í hesum sambandi hevur Umhvørvisstovan havt fund við umboð frá Tórshavnar kommunu tann 19. juni 2020. Umhvørvisstovan gjørdi vart við, at í øki D1 og D2 í Havnardali verður óljóðið frá vindmyllunum í Flatnahaga væl oman fyri markvirðini, sum Umhvørvisstovan metir skulu vera fyri ljóðviðkvom øki. Sambært nýggjastu ljóðkortunum verður ljóðstyrkin, tá ið vindferðin er 8 m/s, oman fyri 44 dB(A) í vestara parti á D1 og annars millum 39 og 44 dB(A) á eystar parti. Á D2 verður ljóðstyrkin umleið 39 dB(A).

Økini D1 og D2 eru sum nevnt ætlað til frítíðarendamál, og kunnu øki sum eru ætlað til frítíðarendamál verða bólkað sum antin ljóðviðkvom ella ikki. Tað er kommunan sum í byggisamtyktini avgerð hvussu øki eru bólkað. Í byggisamtyktini eru ongar ásetingar um ljóð á D1 ella D2 økjum. Øki til ítróttarendamál verða vanliga ikki mett at verða ljóðviðkvom. Harafturímóti eru frílendi, eitt nú viðarlundir o.t., ofta eyðmerkt sum ljóðviðkvom øki.

Í skrivi, sum varð sent til Tórshavnar kommunu hin 26. juni 2020, heitti Umhvørvisstovan á kommununa um at staðfesta um øki D1 í Havnardali skal metast sum ljóðviðkvæmt. Byggi- og býðarskipanarnevndin hjá Tórshavnar kommunu viðgjørdi fyrispurningin hin 6. august 2020, og hevur svarað fyrispurninginum frá Umhvørvisstovuni. Umhvørvisstovan tulkar svarið soleiðis, at kommunan ikki metir D1 økið í Havnardali at vera ljóðviðkvæmt.

Í kap. 6 eru treytir settar til virksemið, harundir fyri óljóð og skuggakast.

Umsóknin, umhvørvisárinsmetingin, annað samskifti við SEV og Tórshavnar kommunu og norðurlendskar reglur um vindmylluvirksemi, hava verið grundarlag undir málsviðgerðini og góðkenningini.

Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð tann 17. august 2020 send P/F Magn og Tórshavnar kommunu til viðmerkingar. Hvørki P/F Magn og Tórshavnar kommuna høvdu viðmerkingar til hoyringarskrivið.

# 6. Góðkenningartreytir

Henda góðkenning er galdandi fyri rakstur av seks Enercon E-82 vindmyllum í Flatnahaga. Umhvørvis-góðkenningin er givin við treytunum niðanfyri:

## 6.1. Almennar treytir

6.1.1. Magn skal boða Umhvørvisstovuni frá, tá farið verður undir verkætlanina. Verður verkætlanin ikki sett í verk innan tvey ár frá tí, at umhvørvisgóðkenning er lýst, fellur góðkenningin burtur.

6.1.2. Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð finnast á virkinum, og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og verða kunnað um ta lóggávu, sum góðkenningin er grundað á.

6.1.3. Sýnistøkur og kanningar skulu gerast av felag, sum hevur førleika og útgerð til at gera hesi.

6.1.4. Allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum verða goldnar av Magn.

6.1.5. Virksemið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið økir um óljóð, skuggakast ella aðra dálking ella ampar, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa víðkan ella broyting.

6.1.6. Eigaraskifti, navnabroyting ella avtøka skal fráboðast Umhvørvisstovuni. Um virksemið heldur uppat, ella mylla brotnar og gerst óvirkin, skal alt tilfar og øll útgerð beinast burtur og økið skal ruddast.

## 6.2. Innrætting og rakstur

6.2.1. Vindmyllurnar skulu staðsetast, rekast og viðlíkahaldast soleiðis, at treytirnar í hesi góðkenning altíð verða hildnar.

6.2.2. Dentur skal verða lagdur á at fara vandaliga um, tá jørðarbeiðið verður gjørt, og tá vindmyllurnar verða settar upp, við m.a. at tryggja, at burturkast ikki rekst uttanfyri byggiøkið.

6.2.3. Tilgjørdu økini við myllurnar og vegirnir skulu ruddast og haldast ruddilig, so skjótt arbeiðið at seta vindmyllurnar upp er liðugt og í seinasta lagi tvær vikur eftir, at myllurnar eru tiknar í nýtslu.

6.2.4. Alt virksemið skal fara fram soleiðis, at tað í minst møguligan mun hevur við sær ampar av t.d. óljóði, skuggakasti og endurskini.

6.2.5. Tryggjast skal, at olja ella onnur heilsu- og umhvørviskaðilig evni frá virkseminum ikki seta út í jørð, áir ella vøtn.

6.2.6. Burturkast frá viðlíkahaldi o.ø. skal latast til góðkendan móttakara beinan vegin, sum arbeiðið er liðugt, og má ikki goymast á staðnum, har vindmyllurnar standa.

6.2.7. Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[4] og skal latast til móttakara, sum hevur góðkenning at taka ímóti burturkasti.

6.2.8. Áðrenn vindmyllurnar verða tiknar niður, skal felagið gera eina ætlan um niðurtøku, endurnýtslu og burturbeining av tilfari, og senda Umhvørvisstovuni hana í minsta lagi seks mánaðir, áðrenn arbeiðið byrjar.

## 6.3. Óljóð

6.3.1. Samlaða óljóðsstøðið frá vindmyllunum, ásett sum ekvivalenta, korrigeraða óljóðsstøðið í dB(A), skal ikki fara upp um niðanfyri nevndu mørk:

(1) Á ljóðviðkvomum økjum, ið sambært kommunalu byggisamtyktini eru løgd av til eitt nú bústaðir, stovnar, summarhús ella onnur frítíðarendamál, skal óljóð frá myllunum ikki fara upp um:

(a) 39 dB(A) tá vindferðin er 8 m/s og

(b) 37 dB(A) tá vindferðin er 6 m/s.

(2) Við bústaðir í økjum, sum sambært kommunalu byggisamtyktina ikki eru løgd út sum bústaðarøki, skal óljóð ikki fara upp um:

(a) 44 dB(A) tá vindferðin er 8 m/s og

(b) 42 dB(A) tá vindferðin er 6 m/s.

(3) Samlaða lágfrekventa óljóðið frá vindmyllum skal innandura í bústøðum ikki vera hægri enn 20 dB(A), bæði tá vindferðin er 8 m/s og 6 m/s.

6.3.2. Undantak at halda hesi markvirði verður givið fyri part av A1 økinum niðan fyri Oyggjarvegin, sum sambært kommunalu byggisamtyktini er lagt av til bústaðir, treytað av, at bústaðir ikki verða bygdir á hesum øki. Viðvíkjandi øki D1 metir kommunan ikki, at økið skal viðgerast sum ljóðviðkvæmt, og tí eru markvirðini fyri óljóð ikki galdandi í hesum øki. Somuleiðis er øki D2 ikki mett at vera ljóðviðkvæmt.

[4] Kunngerð nr. 147 frá 19. oktober 1995 um burturkast, broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.

## 6.4. Skuggakast

6.4.1. Skuggakast frá vindmyllunum kann í mesta lagið vera 10 tímar um árið í bústaðarøkjum.

## 6.5. Innaneftirlit og umhvørvisstýrisskipan

6.5.1. Magn skal hava eina umhvørvisstýrisskipan, sum tryggjar, at treytirnar í góðkenningini verða hildnar.

6.5.2. Um ampar verða av óljóði ella skuggakasti kann Umhvørvisstovan krevja, at Magn skjalprógvar, at treytirnar um óljóð og skuggakast verða hildnar.

6.5.3. Umhvørvisstovan kann krevja, at Magn ger serligar kanningar og greiningar fyri at meta um møguligar ampar ella árin frá virkseminum, tó í mesta lagi eina ferð um árið. Kanningarskrá skal tá frammanundan sendast Umhvørvisstovuni til góðkenningar.

## 6.6. Óhapp

6.6.1. Har vandi er fyri spilli av kemikaliium, herundir olju, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum

6.6.2. Henda óhapp við myllunum, skulu tiltøk beinanvegin setast í verk til at avmarka dálkingina, umframt at upptøka og burturbeining av lutum og tilfari verður sett í verk, so skjótt tað letur seg gera. Størri óhapp, útlát ella dálking skulu skjótast gjørligt fráboðast Umhvørvisstovuni[5]. Innan ein vika er farin, skal ein frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk til upprudding v.m. sendast Umhvørvisstovuni.

## 6.7. Rakstarskráseting og umhvørvisfrágreiðing

6.7.1. Magn skal skráseta hesar upplýsingar:

- Orkuframleiðsla (GWh/ár),
- Rakstrartrupulleikar/óhapp,
- Deyður ella særdur fuglur, funnin í økinum (tíð, staður, slag og orsøk),
- Klagur ella fráboðanir um óljóð, skuggakast ella onnur umhvørvisviðurskifti, og hvat Magn hevur gjørt við tær,
- Onnur viðurskifti av umhvørvisligum týdningi.

6.7.2. Rakstrarskrásetingar skulu goymast í 5 ár og skulu til eina og hvørja tíð kunna leggjast fyri eftirlitsmyndugleikan.

6.7.3. P/F Magn skal á hvørjum ári gera umhvørvisfrágreiðing við uppgerð av rakstrarskrásetingum, frágreiðing um umhvørvisviðurskifti, óhapp, gjørd og ætlað umhvørvistiltøk. Frágreiðingin skal sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 1. mars í avloysandi árinum.

---

[5] Dálkingaróhapp skulu eisini fráboðast til Løgregluna (dálking á landi) ella til Sjóbjargingarstøðina, MRCC-Tórshavn (dálking á sjónum).

## 7. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Kærur skulu vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi 18. september 2020.

**Avrit:** Tórshavnar kommuna, Vaglið, Tórshavn
Postsmoga 32, FO-110 Tórshavn.